# TILTØK

**Gudstænastur**
**Dýra biðidag**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Heri Joensen
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Sverri Steinhólm, altarg., skriftamál kl. 10.40
***Nólsoy:*** kl. 12.00, Sonja Klein
***Kaldbak:*** kl. 12.00, Bjarni Bæk, altarg
***Kirkjubøar kirkja:*** kl. 12.00, Bergur D. Joensen
***Kvívík:*** kl. 12.00, konfirmatión, Marjun Bæk
***Vestmanna:*** kl. 11.00, Inga Poulsen Dam
***Hósvík:*** kl. 11.00, Mogens Tilsted Christensen. ***Í Vestmanna, Hósvík, Hvalvík, Haldarsvík og Tjørnuvík gongur talvan fyri Guðs orðs boðan.***
***Sørvágur:*** kl. 11.00, David Johannesen
***Sandavágur:*** kl. 11.00, Hartvig Wagner
***Selatrað:*** kl. 11.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Eiði:*** kl. 11.00, Emil Olsen (útvarpað).
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00, Martin R. Jacobsen
***Leiti:*** kl. 12.00,
***Eldrabýlið í Vági:*** kl. 14.00, Patrick de Neergaard
***Øravík:*** kl. 11.00, Jónsvein Bech

**4. sunnudag eftir páskir**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Heri Joensen
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00 Bjarni Bæk
***Nólsoy:*** kl. 12.00, Sonja Klein, konfirmatión
***Hest kirkja:*** kl. 12.00, Bergur D. Joensen
***Kollafjørður:*** kl. 11.00, konfirmatión, Marjun Bæk
***Kvívík:*** kl. 12.00, altarg., skriftarmál kl. 11.50, Inga Poulsen Dam
***Hvalvík:*** kl. 12.00, Mogens Tilsted Christensen
***Miðvágur:*** kl. 11.00, nýggj kirkjuklokka verður tikin í nýtslu, Hans Jacob Joensen, biskupur og David Johannesen
***Skála:*** kl. 11.00, (Kórið hjá Jóhan Mortensen), Jógvan Fríðriksson
***Eiði:*** kl. 10.40 skriftamál, kl. 11.00 messa Hartvig Wagner og Emil Olsen
***Vágur:*** kl. 11.00,
***Sumba:*** kl. 12.30, Patrick de Neergaard
***Fámjin:*** kl. 12.00, Jónsvein Bech

**Ebenezer**
Týsdagin kl. 19.00 Sangvenjing, Gospel Hearts - venja í Hebron á Argjum kl. 20.00 Sangvenjing, Ebenezerkórið - venja í Hebron á Argjum.
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti - Talari: Anja Nielsen. Møti er í Hebron á Argjum.
Fríggjadag kl. 20.00 Teen-Night - er í Sloans húsið á Tinghúsvegnum.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Mánadagin kl. 17.30 Juniormøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti fyri 18 ár og eldri.
Týskvøldið kl. 20.00 Bibliutími, Matt. 11, 1-19.
Mikudagin kl. 19.00 venur Meinigheitskórið.
Dýra biðidag kl. 18.00 Møti v/ Klæmint Tausen.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Andrass Arge, Meinigheitskórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hebron, Argir**
Mánakvøldið kl. 19.00 BeTwix. Vit fáa vitjan av teimum ungu í Siloa í Fuglafirði.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bibliutími og bønarløta.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 12.00 Møti, Óli Steinberg, trúboðari í Grønlandi, greiðir frá. www.hebron.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Týsdagin kl. 20.00 Felags hornvenjing.
Mikudagin kl. 15.00 Bøn.
Hósdagin kl. 20.00 Heimaforbundið - fyri allar kvinnur. Hornvenjing v/ major Hagen kl. 20.00 í Evangeliihúsinum.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Mánadagin kl. 17.15-18.00 venur Barnakórið, kl. 20.00 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Samkoman v/ Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Týskvøldið samlast húsbólkarnir. www.livdin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur, nýggir sangarar eru vælkomnir við.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Týskvøldið kl. 20.00 Bíbiltími.

**Saron, Vestmanna**
Týsdagin húsmøti hjá Kristu og Fríðbjørn Poulsen kl. 20.00.
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagin kl. 20.00 Bíbiltími.

**Ósáskúlin, Klaksvík**
Mánakvøldið kl. 20.00 Evangel. møti við Erik Lund og Lloyd Haugen. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Klaus Møller.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Klaus Møller. Evni: Grøðing, biður fyir sjúkum.
Barnamøti kl. 17.00.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Eiðis kirkja**
Dýra biðidagskvøld byrjar fyrilestrarøð í Eiðis kirkju við prestinum Hartvig Wagner um hámessuna (gudstænasta - søguligt yvirlit, bygnaður og innihald).
Dýra biðidagskvøld kl. 18.00 Hámessa I.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Hámessa II.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Hámessa III.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20.00 Bíliutími Efes. 5. kap.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Týskvøldið kl. 20.00 Bíbliutími og bønarmøti.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Týsdagin kl. 20.00 Streingjakórið øvar.
Mikudagin kl. 19.00 Heimaforbundsmøti.
Hósdagin kl. 17.00 Barnakórið øvar.
Fríggjadagin - Dýra biðidag kl. 16.00 Útimøti í Sumba.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, Magnus Jensen talar. Øll eru vælkomin.

**Evangeliskir fundir í DK**
Hóskvøldið 11. mai kl. 19.30 verður evangel. fundur í Sædding Center, Sædding, Esbjerg.
Leygarkvøldið 13. mai kl. 19.00 Evangel. fundur í Skolehjemmet, Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið 14. mai kl. 17.00 verður Evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle.
Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar bjoða vit ein góðan kaffimunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Möti hvört sunnukvöld kl. 20.30.

**Føroyskur ársdagur 06 í Århus**
Aftur í ár bjóða vit til ein føroyskan ársdag, ið verður hildin á MF (menighedsfakultetet), sum liggur á Katrinebjergvej 75 í Århus.
Ì ár fáa vit vitjan av kórinum úr KFUM&K í Klaksvík, við umleið 35 sangarum og eisini kemur stud.teol Hanus Simonsen í Norra, at hava bíbliutíma fyri okkum.
Dagsskrá: kl. 09.45 Kaffi og rundstykkir, kl.10.45 Bíbliutími v/Hanusi Simonsen evni: "At fylgja Jesusi eftir!" kl.12.00 Frokost, kl.13.15 Àhugatímar. Nr 1. V/Suna Johannesen, evni: "Tað loynda og hitt sjónliga lívið" Nr 2. v/Hera Elttør evni: "Mín náðigáva, hvat og hvussu?" Nr 3. Àhugatími fyri børnini v/Leilu og Bárur Nielsen - evni: "Jesus og børnini" kl. 15.00 Kaffi – fríløta – spøl – gongutúr - sang o.a. Kl. 17.30 Náttverði. Kl. 19.00 Møti v/KFUM&K kórinum úr Klaksvík. Fyri at eitt slíkt tiltak kann læta seg gera, er neyðugt við tilmelding og eisini er neyðugt, at vit gjalda fyri luttøku og eru tí hesir prísir:
Luttøka fyri allan dagin:
a. Vaksin 130,-kr
b. Børn 6 til 12 ár 50,-kr
c. Børn 5 ár og yngri ókeypis
Tilmelding helst áðrenn 10. mai. Møguleiki er at ringja ella senda teldupost við sínari tilmelding, til trúboðaran: Heri Elttør tlf. 97473786 ella herielttor@tele2adsl.dk

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 8. mai***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
***Túrur til Suðuroyar við nýggja Smyrli 18. mai. Úr Havn kl. 10.30 og av Tvøroyri kl. 17.30.***
kl. 14.00-17.00 Kortspæl, telving, landastrok, kánus, bobb o.o spøl
kl. 10.00-17.00 ***Nøvn á gamlar myndir,*** Birgar Johannesen.
***Týsdagin 9. mai***
kl. 10-11.30 Sangur, Simme Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00 Í brennideplinum, Benny Samuelsen/Rúna Sivertsen
***Mikudagin 10. mai***
kl. 10-12.00 Handverk. Vegleiðing er á staðnum.
kl. 12.00 Vit eta egnan matpakka
kl. 15.00-17.00 Opið hús
***Hósdagin 11. mai***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00 Telduprát - Vegleiðing er á staðnum.
kl. 14.00-17.00 Boccia í kjallaranum - Alma Poulsen
***Fríggjadagin 12. mai***
Dýri biðidagur - stongt.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Mánadagin 8. mai***
Fimleikur, Felagssangur.
***Týsdagin 9. mai***
Myndaskering v/ Hjalmar Olsen
***Mikudagin 10. mai***
Boccia
***Hósdagin 11. mai***
Opið hús
***Fríggjadagin 12. mai***
Dýri biðidagur - stongt.

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

***Mikudagin 10. mai verður farið ein lættan gongutúr av vegnum niðan á Knúk og heim í Slavansdalin. Petur Hentze verður ferðaleiðari. Vit ganga heim í Slavansdalin har vit fáa drekka í Fjallasmáttuni. Tað er eisini møguligt at blíva koyrdur beint í Slavansdalin. Farið verður úr Tilhaldinum kl. 14.00. Neyðugt er at tekna seg til túrin í Tilhaldinum ella á tlf. 211921. Kostnaður 50.00 kr.***

**Dagtilhaldið á Strondum**
***verður opið týsdag og hósdag kl. 15.00-18.00.***
***Týsdagin 9. mai***
hugna vit okkum sum vanligt.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag
kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag
kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik

*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**V4**
**Dráttur nr. 1635, tann 6. mai 2006**

4 - 7 - 9 -10 -17 - 18 - 23 - 35 - 37 - 43 - 44 - 45 - 56 - 57 - 78 - 80

**Eingin vinnari funnin.**
Vinningurin er fluttur til næsta drátt.

**Eykavinningur - Shell viðskiftakort.**
Snars. nr. 3158199, Leirvík.

**Brúdleyp**
Leygardagin 13. mai kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni Karina Joensen, Klaksvík og Mikkjal Pauli Lamhauge, Tórshavn. Veitslan verður hildin í Skálanum fyri innbodnum.

Leygardagin 10. juni kl. 14.00 giftast í Betania í Þorkeri, Sigrid í Skemmuni, Þorkeri og Gimme Andreassen, Vágur. Veitslan verður í skúlanum í Þorkeri kl. 18.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 20. mai á tlf. 373759/373287.

Leygardagin 10. juni kl. 15.00 giftast í Hvalvíkar kirkju Gunnvá Svartá, Hvalvík og Martin Wennerström, Tórshavn. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 20. mai á tlf. 316969, 218099, 422239 ella 315109.

Leygardagin 17. juni kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum, Súsanna Kass Nielsen, Nes og Heini Súnason Kristiansen, Skáli. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17.30. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 7. juni á tlf. 211222, 507600 ella 448321, 441539.

Leygardagin 8. juli giftast Andrea Thomasen av Viðareiði og Ottar í Funningsstovu úr Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 15.00. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 313179, 213179 ella 513179 áðrenn 8. juni.

Leygardagin 8. juli kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Sigrun Knudsen, Saltangará og Arni Højgaard, Toftir. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 8. juni á tlf. 448065, 448379 ella 0045 32886759.

**Silvurbrúdleyp**
Tann 9. mai hava Anna og Justinus Poulsen, Hvannasund, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima 12. mai - Dýra biðidag frá kl. 15.00.

Tann 9. mai hava Miriann og Jógvan Dam, Kollafirði, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við vælkomst Dýra biðidag 12. mai í Missiónshúsinum í Kollafirði frá kl. 12.00-18.00.

**Konfirmantar í Nólsoyar Kirkju sunnudagin 14. mai 2006 klokkan 11.00**
Hákun Andreas Hansen
Hanus Pál Jógvansson
Bjartmar Petursson
Ragna Ámundardóttir í Geil
Barbara Hansen
Rakul Joensen
Maria Poulsen